# Løgtingsins Trivnaðarnevnd á kunningarferð í Grønlandi 4. – 12. september 2024



## Við á ferðini vóru:

Jørgen Niclasen, formaður
Liljan Weihe, næstforkvinna
Árni Skaale, løgtingslimur
Súsanna Bertholdsen, løgtingslimur
Hans Jacob Thomsen, løgtingslimur
Poula Árnadóttir Lervig, nevndarskrivari

## Flogferðir:

Mikudag 4. september 2024: Vágar – Keflavík – Kulusuk – Tasiilaq
Mánadag 9. september 2024: Tasiilaq – Kulusuk – Nuuk
Mikudag 11. september/hósdag 12. september 2024: Nuuk – Ilulissat – Keflavík - Vágar

## Samskipan:

Kunningarferðin varð løgd til rættis saman við Hjørdis Viberg, økisstjóra í Komuneqarfik Sermersooq, og Honnu í Horni, sendikvinnu Føroya til Íslands, sum eisini fevnir um Grønland.

## Mikudagur 4. september 2024

Nevndin fleyg úr Vágum kl. 12:25 og lendi í Keflavík kl. 13:15. Haðani varð flogið til Kulusuk kl. 17:30 har vit lendu kl. 18:15. Haðani varð flogið til Tasiilaq kl. 19:10, har vit lendu kl. 19:25. Síðani varð farið á hotellið, Hotel Angmagssalik, har nevndin gisti.

## Hósdagur 5. september 2024

10:00 *Vitjan í Býráðssalinum í Tasiilaq*

Hjørdis Viberg, økisstjóri í Kommuneqarfik Sermersooq, Justus Hansen, varaborgarstjóri og Ole Jens Lundblad frá umsitingini luttóku.

Hjørdis greiddi frá um Tasiilaq og Eysturgrønland. Um søguna hjá Eysturgrønlandi og bygdunum har og um nýggju stórkommununa Kommuneqarfik Sermersooq, ið fevnir bæði um Nuuk og bygdirnar á eysturstrondini.

Tasiilaq og Eysturgrønland sum heild er sera avskorið frá restini av landinum um veturin, tá ísurin ger, at til ber ikki at sigla til strondina. Tá er tyrlan einasta farleið, og hesa tíðina á árinum er ofta ringt veður, so viðhvørt hendir, at bygdirnar eru uttan samband í fleiri dagar.

Serliga náttúran og tað, at økið er so avskorið, hevur gjørt sítt til, at ferðavinnan vindur meira og meira uppá seg. Roynt verður at gera ferðavinnuna til eina vinnu, sum lokala samfelagið kann njóta gott av, og sum kann vera eitt veruligt íkast til menningina av økinum og fólkinum, sum býr har.

Eysturgrønland er eitt øki, ið hevur stórar sosialar avbjóðingar. Hóast hetta so verður arbeitt áhaldandi við at hjálpa og veita tænastur til teirra, ið hava tørv á hesum.



13:00 *Vitjan á sjúkrahúsinum í Tasiilaq*

Lydia Maria Helms, yvirlækni, og Ina Kilime Mikaelsen, sjúkrarøktarfrøðingur, tóku ímóti og greiddu frá.

Á sjúkrahúsinum í Tasiilaq fekk nevndin innlit í, hvussu tað er at reka eitt lítið sjúkrahús á einum so fjarskotnum stað sum í Eysturgrønlandi. Á sjúkrahúsinum starvast 3 læknar og afturat teimum sjúkrarøktarfrøðingar, heilsustarvsfólk og fólk í umsiting. Sjúkrahúsið røkir uppgávurnar á allari eysturstrondini, og læknar fara javnan á sjúkravitjan í bygdunum. Telemedisin er ein møguleiki, men av tí at internet-sambandið til eysturgrønlands er so vánaligt, so ber hetta ikki altíð til.

Stór útskifting er í starvsfólkahópinum av tí at serliga læknar koma aðrastaðni frá og starvast í avmarkaði tíðarskeið. Í Grønlandi hava fólk ikki egnan kommunulækna, men kommunulæknar eru staðsettir á sjúkrahúsunum.

At enda fekk nevndin rundvísing á sjúkrahúsinum.



15:00 *SiuTsiu*

www.siutsiu.gl

SiuTsiu er eitt serligt grønlendsk socio-økonomiskt átak, sum er samstarv millum tað almenna og privatu vinnuna um at fáa fleiri ung út á arbeiðsmarknaðin. SiuTsiu er ein sjálvsognarstovnur, sum samstarvar við almennar og privatar fyritøkur um at seta í starv og uppkvalifisera ungfólk, og hjálpa teimum víðari út á arbeiðsmarknaðin ella í útbúgving.

Í Tasiilaq verður gjørt alt frá at rudda kava til málaraarbeiði. Eisini er ein flottur havi gjørdur, sum allir íbúgvar í býnum kunnu fáa gleði av.



17.00 *Vitjan umborð á Juvel II*

Juvel II er eitt trúboðaraskip, ið hvørt ár vitjar býir og bygdir í Grønlandi. Skipið varð statt í Tasiilaq hesar dagarnar, ið nevndin var har, og nýtti nevndin tí høvi at vitja umborð og fáa innlit í ta stóra og gevandi arbeiði, ið hesi fólk gera í Grønlandi.




## Fríggjadagur 6. juni 2024

10:00 *Barna- og familjufyrisitingin*

Gerda Fleischer, fakligur stjóri fyri økið børn og ung, tók ímóti og greiddi frá.

Gerda greiddi frá, hvussu økið er skipað og um tær fyriskipanir, ið hava til endamáls at hjálpa børnum, ungum og familum, ið hava avbjóðingar. Millum fyriskipanirnar eru fosturfamiljur, barnaheim og íbúðir til ung í eftirvernd. Avbjóðingarnar á sosiala økinum í eysturgrønlandi eru nógvar og ofta truplar at handfara.

13:00 *Skúlin í Tasiilaq*

Miriam Vang, skúlastjóri, tók ímóti og greiddi frá. Skúlin í Tasiilaq er ein stórur skúli við uml. 370 næmingum frá 1. – 10. flokk. Í løtuni starvast 48 lærarar á skúlanum, men neyðugt er við nógv fleiri lærarum til at nøkta tørvin, sum næmingarnir hava á bæði fakligari og persónligari menning. Í Tasiilaq – og eysturgrønlandi annars – tosa tey

eysturgrønlendskt, men hetta er ikki eitt skriftmál. Tað merkir, at útbúgving og upplýsing er sera krevjandi, tí alt undirvísingartilfar er á vesturgrønlendskum og donskum. Afturat hesum kemur avbjóðingin av at børn her – eins og aðrastaðni – velja enskt framum onnur mál, eisini teirra móðurmál.

Í 9. og 10. flokki koma næmingar úr hinum bygdunum í eysturgrønlandi at ganga í skúla í Tasiilaq. Hesi búgva á næmingaheimi í býnum, meðan skúlagongdin er.



15:00 *Vælferðarumsitingin*

Kurt Rokholm Pedersen, leiðari fyri vælferðardeildina, tók ímóti og greiddi frá um økini myndugleikaábyrgd, búeindir í psykiatriini, arbeiðsmarknaður, eldraíbúðir og ellis- og røktarheim og heimahjálp.

Nevndin fekk innlit í, hvussu økið er skipað og býtt millum ymsu vælferðarøkini. Nógv verður gjørt burturúr at hjálpa við teimum avbjóðingum, ið serliga gera seg galdandi í økinum, m.a. eru fleiri skipanir, ið hava til endamáls at førleikamenna bæði yngri og eldri,

so at hesi koma út á arbeiðsmarknaðin. Eisini varð greitt frá um skipanirnar við eldraíbúðum og royndum við at fólk búgva heima sum longst.

Vælferðardeildin í Tasiilaq arbeiðir sjálvstøðugt hóast ein partur av kommunalu vælferðarfyrisitingini, sum er staðsett í Nuuk. At samfelagið er so lítið ger tað lætt at samstarva tvørturum geirar, og ofta verða lokalar loysnir mentar, sum eru skræddaraseymaðar til lokala samfelagið.



16:00 *Vitjan hjá Ado og Evu*

Nevndin endaði dagin inni hjá Ado (Adolf) og Evu, ein fitt og hugnalig familja í býnum. Ado er tónleikari og spældi eitt lag fyri okkum. Eva arbeiðir á ellisheiminum í bygdini. Hon er útbúgvin heilsuhjálpari.

Ado hevur í áravís arbeitt við einari orðabók, sum skal týða millum eysturgrønlendskt, vesturgrønlendskt, enskt, danskt og franskt. Hetta arbeiðið verður givið út í næstum. Hetta fer at hava stóran týdning fyri eysturgrønlendingar, bæði málsliga og mentanarliga.



## Leygardagur 7. september 2024

Serliga veðurfyribrigdi “Piteraq” rakti Tasiilaq og Eysturgrønland hendan dagin við sera ringum veðri. Hetta hevði við sær, at nevndin ikki slapp til Nuuk sum ætla. Fráferðin til Nuuk varð útsett til mánadagin 9. september.

## Sunnudagur 8. september 2024

Nevndin fekk ein eyka dag í Tasiilaq orsaka av illveðrinum. Henda dagin nýtti nevndin til at kunna seg um og vitja ymiskt í býnum, sum annars ikki varð partur av almennu skránni. Nevndin vitjaði m.a. á lokala savninum í Tasiilaq, á vatnorku- og elveitingarverkinum í býnum og heima hjá Miriam og Niels

Vang, ið bæði eru føroyingar, Miriam er tó uppvaksin í Nuuk. Miriam er skúlastjóri og Niels hevur ábyrgdina av vatnorku- og elveitingarverkinum. Eisini eru tey trúboðarar og hava búð í Eysturgrønlandi í nógv ár, fyrstu árini í lítlu bygdini Kuumiut og nú í Tasiilaq.



## Mánadagur 9. september 2024

Ferðadagur Tasiilaq – Nuuk. Nevndin fór við báti úr Tasiilaq kl. 9.15 og kom til Kulusuk kl. 10.00. Víðari til Air Greenland við fráferð úr Kulusuk kl. 13.00 og komu til Nuuk kl. 14.30. Í Nuuk gisti nevndin á Hotel Hans Egede.

## Týsdagur 10. september 2024

10:00 *Socialstyrelsen*

Stjóri fyri Socialstyrelsen Tina Evaldsen tók ímóti. Hon og onnur viðkomandi starvsfólk á økinum greiddu frá um, hvussu økið er skipað, og hvørjar tænastur og fyriskipanir, ið verða veittar. Eitt økið, ið verður raðfest ovarlaga, er "Tidlig indsat", á føroyskum "Tiltøk í tøkum tíma". Endamálið er at seta hjálp og fyriskipan í verk so tíðliga sum gjørligt, soleiðis at børnini fáa bestu byrjanina uppá lívið. Eisini verður ein skipan royndarkoyrd í løtuni, sum hevur til endamál at fáa viðkomandi talgildar upplýsingar um børn víðari frá barnagarði til skúla og aðrar viðkomandi myndugleikar, soleiðis at upplýsingar ikki detta niðurímillum og børnini harvið ikki fáa tað hjálp, sum tey hava tørv á.



13:00 *Grønlands Børnerettighedsinstitution (MIO)*

Ditte Sølbeck, ráðgevi, tók ímóti og saman við starvsfólkum á stovninum greiddi hon frá um virksemi hjá grønlendska barnatalsfólkinum. Stovnurin hevur virka síðani 2012, og ger eitt miðvíst arbeiði fyri at virka sum talsfólk hjá grønlendskum børnum. Í mun til føroyska barnaumboðið er grønlendska barnatalsfólkið ein stovnur, ið fer aktivt út og talar søk barnanna.



14:00 *Dronning Ingrids Hospital (Sana)*

Tina Amondsen, stjóri í grønlendska sjúkrahúsverkinum, og Nike Berthelsen, aðalstjóri í grønlendska heilsumálaráðnum, tóku ímóti og vísti nevndini runt á ymsu deildunum í sjúkrahúsinum. Tina greiddi frá heilsuøkinum í Grønlandi, herundir um avbjóðingarnar við frástøðuni til tey ymsu økini. Grønlendska heilsuverkið nýtir telemedisin, tvs læknaviðtalu umvegis internetið, men óstøðuga netið í Grønlandi ávirkar hesa tænastu nógv. Eisini fekk nevndi frágreiðing um, hvussu apoteksverkið er skipað. Heilivágur í Grønlandi er ókeypis fyri borgaran, men harafturímóti ber bara til at fáa ávís sløg av heilivági.

Henrik L. Hansen, landslækni og fyrrverandi landslækni í Føroyum, greiddi frá um læknastovnin í Grønlandi og hvussu hesin virkar.





19:00 *Døgurði saman við umboðum fyri Føroyingafelagið í Nuuk*

Nevndin fekk høvi at hitta umboð fyri føroyingar, sum búgva og búleikast í Nuuk.



## Mikudagur 11. september 2024

12:00 *Allorfik (avvenjingarstovnur)*

Efraim Olsen, leiðari fyri stovnin, tók ímóti og greiddi frá. Allorfik er ein avvenjingarstovnur fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu undir grønlendska heilumálaráðnum, og virkar samstundis sum ein vitanardepil á økinum. Stovnurin hevur virka síðani 2016, og hevur umframt viðgerðarstaðið í Nuuk 4 viðgerðarstøð runt um í Grønlandi. Øll viðgerð er ókeypis.




15:00 *Departementet for Børn og Unge (Brektalsfólkið)*

Kirsten Olesen-Nzufumike, ráðgevi, og Kista Isaksen, deildarleiðari, tóku ímóti og greiddu frá. Nevndin ynskti at fáa kunning um, hvussu grønlendska Brektalsfólkið virkar í sambandi við at brektalfólk verður sett á stovn í Føroyum 1. januar 2025. Brektalsfólkið í Grønlandi er staðsett í Sisimiut, og tískil valdi nevndin at vitja ráðið fyri børn og ung, sum umsita brekøkið, sum er staðsett í Nuuk. Kirsten greiddi frá um virksemi og uppgávurnar hjá grønlendska Brektalsfólkinum.



20:00 Fráferð úr Nuuk til Keflavíkar umvegis Ilulissat

## Hósdagur 12. september 2024

Nevndin ferðaðist heim við Icelandair við fráferð úr Keflavík kl. 8.35 og lendu í Vágum kl. 11.20 lokala tíð.

Tórshavn, 26. september 2024
Poula Árnadóttir Lervig, nevndarskrivari